## DAGSINS MEINING

# Áhugaverd tiltak

Í hesum døgum er stór altjóða fiskarímessa í Runavík. Talan er um føroyskar og útlendskar framleiðarar av útgerð til alivinnu og fiskivinnuna, sum sýna førur sínar fram. Haraftrat verða fyrilestrar hildnir um ali- og fiskivinnuspurningar.

Neyvan nakrantíð áður hava føroyingar dittað sær undir eitt so stórt tiltak, har hundraðtals útlendingar og túsundtals føroyingar eru við so ella so. At hetta tiltak so eisini verður fyriskipað uttan fyri Havnina má eisini sigast at vera nakað nýtt og eitt rættiliga djarvt stig. Tí vanliga verða so stór tiltøk bara fyriskipað í høvuðstaðnum. Tí eiga fyrireikararnir bæði rós og tøkk uppiborna fyri at hava torað at fara út um Havnina við einum so stórum og álvarssomum tiltaki. Hetta siga vit, tí tað má ikki vera ein sjálvfylgja og ein fyritreyt fyri slíkum virksemi her á landi, at alt skal liggja og ganga út frá høvuðsstaðnum.

Nettupp í hesi tíð har roynt verður at fokusera á øki uttan fyri Havnina kemur slík fiskivinnumessa væl við. Við hesum hava norðingar og vágafólk stytri at fara, enn um tiltakið varð í høvuðsstaðnum. Tað er so ein partur. Hin parturin er tað skilagóða í, at vit í Føroyum eisini sjálvir taka stig til stórar messur og ráðstevnur. Oljubólkurin hjá Vinnuhúsinum gekk á odda í so máta og tók stig til fyrstu stóru oljuráðstevnuna í Føroyum. Sjálvandi skulu vit hava okkara egnu vinnumessur og ráðstevnur og sjálvandi skulu vit royna at fáa útlendingar til Føroya. Tað kann so hava tvífalt vinning við sær við tað at vit á henda hátt lata tey fremmandu síggja, hvussu vakur og serstakt land og náttúra okkara er. So messufyrireikararnir skulu vita, at teir við hesum eisini eru við til at marknaðarføra Føroya sum ferðamannaland.

Men fokus er sjálvandi sett á viðurskifti, sum hava tilknýti til báðar høvuðsvinnunarnar, fiskivinnuna og alivinnuna. Og her vita vit, at føroyingar standa sera frammaliga. Onkur bagir hvørki hugflognum, dirvinum og evnunum sjálvir at vilja skapa nakað. Hetta er styrki okkara sum lítil tjóð, og tí kann umrødda messa bara vera við til at stuðla uppundir høvuðsvinnurnar. Tað skal vera vón okkara, at tiltakið fer at eydnast væl og at hetta bert er byrjanin. Við hesum eiga vit eisini at takka fólkunum á Menningarstovuni fyri teirra áhaldandi og treiskna arbeiði at fáa føroyskar framleiðarar o.a. við á messur í útlandinum. Nakað, sum saman við tiltakinum í Runavík, hevur eins stóran týdning fyri okkum øll.

**Sosialurin**

## VIÐMERKINGAR

# Borgarstjórin í Havn brýtur sjálvur grundlógina

Føroya Arbeiðarafelag
*Tórshavn, 16.05.2001*

**Jan Christiansen, borgarstjóri sum hevur meldað FA hevur sjálvur brotið Grundlógina við at nokta starvsfólkum hjá kommununi sjálvi at velja hvar tey gerast limir.**

Vit frætta nú í fjølmiðlunum, at Jan Christiansen, borgarstjóri hevur meldað FA í sambandi við lógliga verkfall okkara.

Tað er ikki sørt mótsigandi, at hesin høgravendi og løntakarafíggindaliga borgarstjóri meldar felag okkara, tá hann samstundis sjálvur noktar at geva starvsfólki sínum rættindi, sum ásett eru í sjálvari Grundlógini.

Borgarstjórin hevur nevniliga noktað, at góðtikið, at limir í Kollafjarðar Arbeiðarafelag framvegis skulu vera limir í hesum felag, hóast hesi starvsfólk skrivliga hava boðað frá, at tey framvegis ynskja at vera limir í felagnum í Kollafirði.

Hesin borgarstjóri hevur víst slíka háan móti starvsfólkum sínum, at hann hevur limað tey inn í annað fakfelag og hevur beint ímóti boðunum frá starvsfólkinum flutt eftirlønargjøld til eftirlønar-skipanina hjá einum heilt øðrum fakfelag.

Tað kann sostatt sigast, at Jan Christiansen alla tíðina hevur víst eina so vanvirðisliga framferð móti vanliga løntakaranum, at tað ikki undrar okkum, at hann nú eisini roynir at gera seg inn á fakfelag okkara, men vit skulu vissa Jan Chrsitiansen um, at um hann vil hava stríð so skal hann sanniliga fáa stríð.

# Smá brúk

**Føroya Óðalsfelag er felagið hjá teimum, sum eiga jørð ella á annan hátt sita við smáum jarðarbrúkum. Felagið fer at gera seg galdandi í kjakinum um privatiseringar av landsjørð**

Tá heystfjøllini verða gingin skriva bløðini javnan um, at bøndurnir siga skurðin verða so og so góðan. Veruleikin er tann, at bøndurnir skera ta minnu helvtina av føroyska skurðinum. Ta størru helvtina eiga óðalsmenn og traðarmenn. Teir smærru festararnar reka festini á sama hátt sum óðalsmenn, afturat aðrari vinnu og í frítíðini. Nógv tann størsti parturin av jørðini í Føroyum er tí á hondum teirra, sum ikki reka vinnuligan landbúnað burturav.

### Veruleikafjart

Bæði matrikullógin og lóg um landsjørð áseta, at jarðarbrúkini skulu leggjast saman. Seinastu álitini um landsjørð mæla til tað sama. Hetta er ein veruleikafjarður dreymur um eina tíð, sum farin er, tá ein hálvmørk kundi forsyrgja einum húski. Veruleikin er tann, at meginparturin av uttangarðsjørðini í Føroyum liggur í felagshagapørtum, ið minna neyvt um partafeløg. Teir verða riknir á tann hátt, at eigararnir býta útreiðslur og ágóða eftir ognarluti. Ein fimmarkarhagi (mørk=16 gyllin) er at meta við eitt partafelag við 80 partabrøvum á eina gyllin hvørt. Fyri ein slíkan haga eins og eitt partafelag er tað umráðandi, at tað ber til lættliga at umseta partabrøvini. Innangarðs kann tó tvera gott at seta ávíst minstamark fyri sølu í tal av fermetrum.

### Frí umsetiligheit

Óðalsfelagið fer at arbeiða fyri, at søla av heilum gyllin verður loyvd uttan avmarkingar. Men, sjálvt um óðalsjørðin verður meira umsetilig, so eru framvegis mong smærri kongsfesti í felagshagapørtum. Hesi eiga festararnir at sleppa at keypa fyri eina meting, so tey gerast óðal. Fyri hagapartarnar verður tað ein vanlukka, um smáu festini verða løgd saman. Tí hagapartarnir geva ov lítið av sær til, at nakar kann liva av pengainntøkunum frá teimum, men samstundis er ov nógv arbeiðið til, at nakar klárar at røkja meiri enn nakrar fáar merkur. Oftast er léttari at røkja skyldurnar, jú minni jørð fólk sita við.

### Smá brúk og smá pláss

Á smáplássunum flytir fólkið, tí ov lítið av pengainntøku er har, og ov langt til almenn tiltøk á stórplássunum. Men, har aðrir inntøkumøguleikar eru, og samferðslan er tolulig, kann jørðin verða partur av trivnaðinum. Í bygdum sum Oyndarfirði eru tey smáu festini av størri týdningi enn tey stóru, tí sama markatal kann geva 10-15 húskjum trivna og íkast, meðan eitt bóndahúski bert fært eina lága inntøku av hesi somu jørð. Samstundis eru tey, ið vitja bygdirnar at røkja nakrar gyllin har, við til at geva smáplássunum lív og virksemi um summari. Óðalsfelagið fer at virka fyri meiri óðalsjørð, fleiri traðum, smærri brúkum og betri trivnaði – óðalsmenn eru smáir, men knáir.

### Óðalsfundur

Óðalsfelagið fer at halda aðalfund mikudagin 23. mai 2001 kl. 19:00 á búnaðardeplinum í Kollfjarðardali, har millum annað landstýrismaðurin í vinnumálum, Bjarni Djurholm, verður við. Nýggir limir kunnu tekna seg á fundinum. Komandi tíðina fara girokort eisini at liggja frammi á posthúsunum um landið, so áhugaði á tann hátt kunnu tekna seg sum limir.

**Stýrið**

# Umberingar

Í tveimum innsendum greinum í blaðnum nú um dagarnar, er tíverri komið fyri, at navnið á tí sum skrivað hevur er dottið burtur. Í tí eina førinum er talan um eina flaggdagsrøðu, sum Demmur Hentze, landsrættarsakførari, helt flaggdagin á Vaglinum. Her eru upplýsningar um navn og hvar røðan er hildin, dotnir burtur. Vit biðja Demmus Hentze halda okkum til góðar.

Í hinum førinum er talan um eina føðingardagsheilsan, sum Jens Smith hevur skrivað til Erik Petersen, musikkskúlalærara, í samband við at hann fyllir 90. Her er navnið eisini dottið burtur og vit biðja Jens Smith halda okkum til góðar.

**Blaðleiðslan**


Sosialurin

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:**
Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:**
Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Tíðindaleiðari:**
Jústinus Eidesgaard justinus@sosialurin.fo
**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Marjun Dalsgaard marjun@sosialurin.fo
Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo
**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
John Johannessen john@sosialurin.fo
Edvard Joensen edvard@sosialurin.fo
Turið Kjølbro turid@sosialurin.fo
Stefan í Skorini stefan@sosialurin.fo
**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
**Myndamenn:**
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Postsmoga 231
Nólsoyar Pálsgøta 1
700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo
**Útgevari/uppseting:**
Sp/f Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin

**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Argjavegur 26,
Tel. 311820, Fax 314720
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 14[00]

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Týsdagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Leygardagsblaðið | Frí. kl. 10 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.